Havnar Bio
kall Coca-Cola

UMMÆLI:

# Eydna og óeydna ganga á rað

## – Just My Luck

**Ashley Albright (Lindsay Lohan) er heldigasta kvinnan í heiminum, hon fær alt hon peikar á. Hon er sum hann sjálvur Fætter Højben. Keypir hon ein lutaseðil, so vinnur hon stóra vinningin. Hon finnur altíð eina taksa, sjálvt um tað regnar av grimd í New York. Hon hevur eitt sera gott arbeiði. Alt gongur væl fyri hesa Ashley. Hon hevur eisini fingið loyvi at samskipa eina veitslu fyri kenda plátuframleiðaran Damon Phillips (Faizon Love).**

**UMMÆLI**
*Kim Simonsen*

Jake (Chris Pine), hinvegin er av óhepnastu fólkum. Tað regnar altíð á hann, og buksurnar eru altíð um at skrædna. Arbeiði hjá honum er at gera reint á vesinum í eini bowlinghøll. Hann er tó ein ordans optimistur, og vónar enn, at tíðinar fara at batna. Hann arbeiðir eisini við at royna at gera rokkorkestrið McFly kendar. Hann vónir at hepnið fer at vísa seg, soleiðis at hann sleppur til ballið hjá Damon Phillips og geva honum eina McFly fløgu.

Av einari ella aðrari orsøk enda hesin óhepni Jake og hin hepna Ashley við at dansa saman á hesum maskuballinum, men okkurt hendir, tey koma at venda øllum við. Við eitt skrædnar kjólin hjá Ashley og skógvanir brotna. Jake hin vegin fær eitt fantastisk kvøld, har hann kemur at bjarga lívinum hjá plátukonginum Damon Phillips, og allara hansara dreymar gerðast veruleiki.

Ashley roynir at finna og endurvinna sína hepnu síður, men er forfylgd av svartasta Andras Dunnu óhepni. Av hesi mótgongd lærir hon eisini okkurt.

Just My Luck er ein heldur einkisigandi filmur. Bert 20 minuttir av filminum hanga saman og eru verdir at síggja, restin er tilgjørt, bert við tí endamáli at forvinna pening. Hann er ein av hesum romantisku skemtifilmum, ið hava nærum einki álvarligt yvir sær. Her er einki serligt við filminum, hvørki søgan ella tey sum spæla er nakað serligt. Her er nærum einki sum kann fanga hyggjaran meiri enn at hyggja eftir Seinfeld ella 10.000 kærleiksfilmunum, ið eru gjørdir.

Just My Luck er samensettur av klassiska Hollywood frásagnarevninum, ið altíð inniheldur eini tvey umslag og eitt "peak" móti endanum. Tað er ikki nogv at siga um hendan filmin. Hann er ikki góður. Hann er tað reina undirhald. Og innan undirhaldsfilmar er hann ikki eina av teim góðu. Filmurin missir flogi og kikar javnan eftir andanum.

Lindsay Lohan er kend frá Disneyfilminum The Parent Trap (Forældrefælden) og seinni í Freaky Friday (2003) og Mean Girls (2004), seinast í Herbie: Fully Loaded (Herbie – for fuld udblæsning, 2005). Chris Pine er kendur frá góðu røðini Six Feet Under. Just my Luck er sjálvandi ein rættuliga fyriboða romantisk komedia.

**2 stjørnur av 6.**



TÍÐIRNAR:

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu




### The Hills have Eyes

*FRUMSÝNING*

| | |
|---|---|
| Fríggjadag 07.07 | kl. 23.30 |
| Leygardag 08.07 | kl. 23.30 |
| Sunnudag 09.07 | kl. 22.30 |




### Just My Luck

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag 07.07 | kl. 19.00 | kl. 23.00 |
| Leygardag 08.07 | kl. 19.00 | kl. 23.00 |
| Sunnudag 09.07 | kl. 19.30 | kl. 22.00 |




### Poseidon

| | |
|---|---|
| Fríggjadag 07.07 | kl. 21.25 |
| Leygardag 08.07 | kl. 21.15 |
| Sunnudag 09.07 | kl. 20.00 |




### Sandheden om Rødhætte

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag 07.07 | kl. 18.00 | kl. 20.30 |
| Leygardag 08.07 | kl. 18.00 | kl. 20.30 |
| Sunnudag 09.07 | kl. 17.30 | |




### Kirikou og de vilde dyr

| | |
|---|---|
| Fríggjadag 07.07 | kl. 17.00 |
| Leygardag 08.07 | kl. 17.00 |
| Sunnudag 09.07 | kl. 18.00 |

www.bio.fo • Telefon 31 19 56